LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

**Tíðindaskriv**

Tórshavn, tann 30. september 2014
J.Nr.: LUM-80- 14/00092-2
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Børn hava eisini rætt

**Børn fáa nú møguleika at klaga til Løgtingsins umboðsmann, um tey halda seg verða skeivt viðfarin. Umboðsmaðurin fer at kunna kanna bæði almennar og privatar stovnar, sum hava ábyrgd av børnum.**

1.oktober 2014 fer Løgtingsins umboðsmaður at hava eftirlit við, at Føroyar halda tað, sum stendur í Barnarættindasáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum um at tryggja rættindini hjá børnum.

Føroyar hava samtykt Barnarættindasáttmálan og hava tí bundið seg til at arbeiða fyri at betra korini og rættindini hjá børnum. Í Barnarættindasáttmálanum stendur, at ein óheftur stovnur skal tryggja rættindini hjá børnum.

Løgtingið hevur samtykt, at eftirlitið við, at Føroyar halda Barnarættindasáttmálan, skal liggja hjá Løgtingsins umboðsmanni. Umboðsmaðurin hevur longu frammanundan eftirlit við, at myndugleikarnir ikki vanrøkja sínar skyldur og gera fólki órætt. Hann viðger eisini klagur frá fólki, sum halda, at ein myndugleiki hevur borið seg skeivt at móti teimum.

Lógin sigur, at Løgtingsins umboðsmaður skal virka sum óheft eftirlit á barna- og ungdómsøkinum. Hann skal viðgera klagur um viðurskifti hjá børnum og sjálvur taka mál upp. Lógin gevur eisini umboðsmanninum loyvi til at kanna og vitja bæði almennar og privatar stovnar og fosturheim, sum hava ábyrgd av børnum.

Børn kunnu til dømis klaga til umboðsmannin, um skúlin ella ein annar myndugleiki ikki vil hjálpa teimum. Tey kunnu eisini klaga, um skúlin ella ein annar myndugleiki hevur tikið eina avgerð, sum tey er ósamd í ella um tey halda, at tey eru skeivt viðfarin. Fleiri dømir kunnu lesast á nýggju heimasíðuni hjá umboðsmanninum: www.bum.fo.

Um Løgtingsins umboðsmaður ikki sjálvur kann hjálpa børnum við teirra trupulleikum, kann hann seta tey í samband við onkran annan, ið kann hjálpa. Umboðsmaðurin fer at virka saman við øðrum myndugleikum, sum arbeiða fyri rættindunum hjá børnum, millum annað við "Tú og Eg Ráðgevingina", sum gevur børnum og ungum ráð og vegleiðing.

*Ynskja tit fleiri upplýsingar, eru tit vælkomin til at venda tykkum til løgtingsins umboðsmann Sólju í Ólavsstovu á telefon 218691*